# yðurin Lambi



## FAKTA um Lambi

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Lambi |
| **Føðidato:** | Umleið 17. apríl 2009 |
| **Føðistaður:** | Kjallnes í Kollafirði |
| **Bústaður:** | Eiði |
| **Pápi:** | Ókendur |
| **Mamma:** | Deyð |
| **Fosturforeldur:** | Veljko og Velika Gjorjieski |
| **Eigari:** | Daniel Magnus Gorgjieski |

*Til fyri kortum búði bóltspælandi Lambi heima hjá Veljko, Velika og Daniel Magnus Giorgjieski, men nú gongur serlig lambið á einum stykki niðan fyri byrgingina á Eiðisvatni*

stykkinum, samstundis sum ovasti parturin ikki sæst av landsvegnum.

- Men onkrar dagar hoyrir tað meg ikki, so tá má eg koyra niðan, fyri at geva tí mjólk. Tá veit eg eisini, at tað stendur ovast við hegnið og bíðar eftir mær. So plagi eg at geva, og so ganga vit ein túr, greiðir makedonin, sum hevur búð á Eiði í trý ár, frá.

### Vil verða bóndi

Fýra ára gamli Daniel Magnus er eisini sera fegin um Lambi. Enntá so fegin, at hann vil gerast bóndi, tá hann verður stórur.

- Daniel Magnus plagar at tosa um, at vit skulu hava eina rúgvu av seyði, so hann kann verða ein ordiligur føroyskur bóndi. So tað hevði kanska verið eitt hugskot at byrja at keypa jørð, greiðir Veljko frá og flennir hjartaliga.

Men enn er Daniel Magnus lítil. Júst fyltur fýra ár. Og tað er ikki altíð eins lætt at vera útlendingur í Føroyum, og heldur ikki at vera av útlendskum uppruna.

- Í fjør mundi eg ikki sloppið at arbeiða, og í dag kemur politiið og sigur við meg, at sonur mín, sum er føddur í Føroyum, og enntá tvær ferðir hevur fingið nýtt pass tvær ferðir, ikki fær nýtt pass. Eg veit ikki, hvussu verður við tí, og eg haldi tað vera at gera gjøldur burturúr okkum. Daniel hevur altíð verið føroyingur við makedonskum foreldrum. Og nú hava vit verið her í sjey ár, og eru klár at gerast veruligir føroyingar, greiðir Veljko frá, áðrenn hann aftur kemur í tankar um Lambi.

Velika og Veljko fluttu úr Makedonia undan kríggi í 2001, og Dagur og Vika hevur kannað málið við Daniel Magnus.

Við Dag og Viku, hevur løgreglan sagt, at tað var eitt mistak at geva Daniel Magnus eitt danskt pass, tí minst annað av foreldrunum skal hava danskan ríkisborgararætt, og tað hevur hvørki av foreldrunum. Men Daniel Magnus kann fáa eitt sokallað fremmadapass, sum vanliga verður givið flóttafólkum.

### Ikki sum aðrir seyðir

Hjá fólki, sum hevur seyð, er vanligt at fletta tað, sum er komið undan um várið á heysti. Men soleiðis verður ikki við Lambi.

- Vit fara sjálvandi ikki at eta tað. Tað er ein partur av familjuni, og vit fara at royna at vera so nógv sum gjørligt saman við tí. Lambi skal sleppa at liva og liva. Líka til tað doyr, ger øll familjan greitt.

- Men vit eta eisini seyðakjøt. Tað smakkar øgiliga væl, og tað hevði Lambi helst eisini gjørt, men sjálvandi fara vit ikki at eta tað, tí Lambi er ikki sum aðrir seyðir, leggur Veljko afturat.



*Lambi hevur fingið hundatekin. Ella tað má helst vera seyðatekin, sum siga, hvør eigur lambið og hvar tað hoyrir heima*